## 2010 verður metár

Higartil hevur norska alivinnan útflutt 33 prosent meiri av laksi enn um somu tíð í fjør, og fólk í vinnuni vænta, at útflutningurin fer at seta nýtt met í ár. Dagens Næringsliv skrivar, at norska alivinnan væntar sær nógv burtur úr tí veksandi marknaðinum í Russlandi, og at møguleikarnir tykjast eisini vera góðir í USA. Í hesum viðfangi vísir blaðið á, at í januar var laksaútflutningurin til USA næstan tríggjar ferðir størri enn í janur í fjør. Tann stóra framgongdin í norska laksaútflutninginum er ein avleiðing av, at laksaútflutningurin hjá Kili er minkaður niður í ein fjórðing orsakað av sjúku.



## Vil hava færri vápn

Fær amerikanski forsetin, Baravk Obama, sín vilja, skal USA hava munandi færri kjarnorkuvápn enn nú. Ein týðandi embætismaður í amerikonsku umsitingini sigur við AP, at forsetin hevur ætlanir um at skerja amerikonsku kjar norkuvápnagoymslurnar munandi. Embætismaðurin sigur, at forsetin og umsiting hansara eru júst nú í ferð við at endurskoða tann amerikanska kjarnorkupolitikkin. Sambært embætismanninum fer USA framhaldandi at hava nóg mikið av kjarnorkuløðingum, til at tað kann ræða onnur frá at brúka slík vápn ímóti USA ella amerikonsku máhugamálum.

# Sita í hvør sínum landi



**Annar av litavunum, sum vórðu varðhaldsfongslaðirí Føroyum í november, tí nógv sterk rúsevni vórðu funnin í bili teirra, er nú fluttur til Danmarkar at sita. Politiið vil ikki hava teir at tosa saman**

RÚSEVNI

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fyrst í november komu tveir litavar til Føroya við bili. Teir skuldu víðari til Íslands sama dag, men tað sluppu teir ikki, tí tollvaldið hevði illgruna um, at rúsevni vóru í bilinum.

Tá ið bilurin nakrar dagar seinni varð pilkaður sundur, varð komið fram á eina stóra nøgd av rúsevnum, og menninir vórðu varðhaldsfongslaðir. Rætturin gjørdi av, at teir skuldu sita avbyrgdir, og tað hava teir gjørt síðan.

Men seinast varhaldsfongslingin skuldi leingjast, vildi rætturin ikki, at teir skuldu sita avbyrgdir í meira enn tvær vikur aftrat. Hinar báðar vikurnar skuldu teir sita varðhaldsfongslaðir sum vanligt.

Í seinastu viku gekk tíðin við avbyrgingini út, og fyri at sleppa undan, at menninir fingu høvi at práta saman, varð annar maðurin fluttur til Danmark at sita víðari varhaldsfongslaður.

Kriminalpolitiið sigur sum minst um hetta málið, ið hevur samband til onnur lond, m.a. til Íslands, har tríggir litavar sita varhaldsfongslaðir, skuldsettir fyri at vera ætlaðumóttakarunum av rúsevnunum.

### Frægari her

Sum skilst hevur annar av litavunum, sum hava sitið í Føroyum, ikki havt tað gott við at sita avbyrgdur. Hesin maðurin situr framvegis í Føroyum, tí hildið verður, at hann hevur tað frægari við at sita í Føroyum enn í einum donskum varðhaldi.

Enn er kriminalpolitiið ikki komið á mál í kanningunum av málunum.

Menninir hava alla tíðina noktað seg sekar, og tað leggur upp til, at teir skulu fyri eitt nevningating.

Tað tekur sína tíð at fyrireika nevningating, tí nýggir nevningar skulu í hvørjum einstøkum føri peikast út.

Málið kann tí í fysta lagi koma fyri rættin í apríl, heldur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini.

# Norska kriminalpolitiið kannar vanskapta toskin

**Síðani seinasta heyst hava fiskimenn fingið nógvan vanskaptan tosk á einum Stórfjørðinum í Vesturnoregi. Nú er málið endað á borðinum hjá kriminalløgregluni**

UMHVØRVI

*Árni Joensen:*
*arnisosialurin.fo*

Norska fiskivinnustýrið hevur illgruna um, at talan kann vera um tosk, sum er sloppin úr ei nari alistøð. Er tað rætt, kann talan vera um álvarssaman umhvørviskriminalitet, sigur kringvarpið NRK.

Myndugleikarnir hava tikið DNA-royndir av toskinum, men hóast fleiri áheitanir hevur fiskivinnustýrið sýtt fyri at almannakunngera úrslitið av royndunum. Tað er nú latið kriminalløgregluni sum møguligt próvtilfar í málinum.

Storfjord Torsk AS er tað einasta alifelagið, sum alir tosk á Stórfjørðinum, men felagið hevur alla tíðina hildið uppá, at tann vanskapti toskurin er ikki úr teirra ringum. Felagið sigur, at tað hevur ikki mist tosk tey seinastu fýra árini.

Kriminalløgreglan dugir ikki at siga, nær hon kann koma við einum úrsliti, tí sjálvt kanningararbeiðið í málinum er ikki byrjað enn.



*Toskurin er fullkomiliga avskeplaður, og mong bíða við spenningi eftir at fáa at vita, hví so er*
*(Mynd: Fiskeridirektoratet)*